# Rannvá í Ribarhúsi

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*


*Rannvá Mortensen*

Listaframsýning við Rannvá Mortensen verður í Gallarí Ribarhús í Fuglafirði fríggjadagin tann 7. juli kl. 19.00.

Eyðun Larsen spælir á klaver, og Jóanes Nielsen lesur nýggjar yrkingar. Á framsýningini vera málningar, kollasjur og grafikkur. Framsýningar verður opin fram til 30 juli.

# Móðir jørð

Nú summarsólin fer í kav
Og litar reytt tað djúpa hav
Hon niður við djúpini fer
Og bert myrkri eftir er

Øll nú til songar fara
Ein nýggjur dagur man læra
Okkum at virðismeta
Og høgt jørðina at seta

Vit um dálking mangan hoyra
Men venda tað deyva oyra
Djór og plantur í hopatal doyggja
Men vit vilja okkum ikki boyggja

Munnu líkasæl vit verða
Tá onkur boðini man bera
At vit okkum sjálvum enda gera á
Tá klókur ei nyttar vera aftaná

Lívið er ein givin gáva
Hóast mangan vit snáva
Harrin okkum upp reisir
Og við trúgv okkum loysir

**Tóra Joensen, Leirvík**

Tað sanna, góða og vakra:

# Hanus Kamban seksti

Honum andin ikki svíkir,
ikki regnið, ikki ódnin
fær hjartað hans at nøtrast.
*Goethe*

Ein indari segði mær frá teirra tíðarfatan, at ein 25 ára gamal kann vera eini áttati, og ein, ið er eitt nú seksti, kann kenna seg sum júst farin um tey tríati. Tað er innari aldurin indarar hyggja eftir, tey hava onga virðing fyri linealum og linjurættari tíð ella rættlinjaðum lívið sum so. Soleiðis er at møta Hanusi, allar fastar vendingar detta niðurfyri, hvør tugd kliché bránar, og allir tankar um aldur geva lítla og onga meining, tí hann er púra sín egin.



### Vakurleiki

Tað, einki hjartað veit,
eingin hugsaði um,
vil í náttarinar einsemi
ferðast gjógnum sálina.
*Goethe*

Hanus er fyri meg høvundi av sera fínum stuttsøgum, týðari av teim bestu heimsbókmentum, ið finnast, Sheakspeare, Poe, Bradbury, Somerseth Maugham, Ballard, Joyce. Hann hevur gjørt sjónvarpssendingar og skrivað størstu føroysku ævisøguna nakrantíð um hin løgnasta persónin Føroyalands klettar hava fostrað, ella var tað nú Hellas og Homer, ið stóðu fyri tí.

Hanus er positivt sæð, ein ið livir uttan tíð og stað. Føroyingur, uppvaksin á bygd, enntá útoyggj, sum hann tók til: »Í Skúgvi var miðøld«, so ferð Hansusar til evropiskar metropolar má hava kenst sum mentanarskelkur, ið vit í dag ikki longur heilt duga at skilja. Sjálvt um hann hevði dvalst í Havn, so vóru Føroyar veruliga fjarskotnar, í mun til okkara tíð og øktu samskiftismenta okkara, ið Hanus av og á hevur at finnast at. Keypmannahavn í mun til Havnina, ein brølandi modernitetur, tølandi fyri nøkur, fullur í møguleikum fyri onnur. Hanus hoyrir til seinasta bólkin, hann skilir betur stórbýin, søguna hjá slíkum býi, reikarar, bohemar sum Janus Djurhuus, Hjalmar Söderberg.

### Sannleiki

Ytst á eggjartromini á
løtuni
standi eg og skríggi:
tað er ein fragd at liva og
umskapast!
*Diktonius*

Eg møtti Hanusar skriving, sum tey flestu, í miðnámsskúlunum. Søgur sum:»Við Edgar Allan Poe í Sólhavn«, »Hin bláa kannan«, »Hin nýggi maðurin«, »Dóttir av Proteus«. Seinni komu vit fram á greinar, ið hevja seg høgt upp um álop frá jantebúgvum á ósek sum á aðrar jantar, frá religi(øru)øsum brotasjógvum móti upplýsing, vitan og ektaðum næstrakærleika, frá tránaðum tjóðskapar skólið, frá høgravendum rindalistum og mentanarligari niðurundirgerð. Slíkt mót gloymi eg ikki. Um hesa tíð las eg eisini Carsten Jensensa bøkur og Henrik Stangerupsa essays úr Danmark, spoli eg aftur, kenni eg aftur eitt lyndi, ið ferðast óskalað frá Brandes til PH, Elsu Gress og beint inn í hjartað hjá Hanus Kamban, hetta at vilja berjast fyri tí sanna. At vera ein intellektuell rødd, ið tekur upp bardagan móti svárum órætti, tølandi orwellskum retorikki, ein indignerað urkraft full av civil curage.

### Góðska

Tú bleika, fína
djarva strála
fyri meg ert tú...
ein troyttur grátur
inni í myrkrinum.
*Ekelund*

Seinni fekk eg høvi at lesa stuttsøgusøvnini, ævisøgurnar (aftur) og nýggja greinasavnið, samstundis sum eg fekk orðið á Hanus sjálvan í eini sending í Útvarp Føroya, har hann vísti sínar mongu síður, og evni fyri tankans hvøssu sælu, har hann prógvaði, at hann hevur royndir og evni fyri veruligum vísdomi.

Hann er ein intellektuellur, ið livir onkunstan oman fyri lívið hjá vanliga borgarinum, ið fær meg at hugsa um, hvat Bourdieu helt fyri um Sartre: »viðurskifti millum »borgaran« og »hin intellektuella«, sum Satre sær hesar, er at borgarin er ein óløgligur bastardur uttan nakra veruliga »veran«, eitt hylki av einki... ið hevur til felag við svínið (í bókini »Kvalme«) og fólkið, at hesi vita hvat tey eru, og einki meiri, mótvegis hesum hevur hin intellektuelli eina frástøðu til sjálvan seg. Hann er skiltur frá síni veran, og frá øllum teim, ið bert eru tað tey eru, gjógnum hesa lítlu, men alt avgerðandi, frástøðu sær ein munin, tí frástøðan er óhappið, ringi standurin, eymdin, armóðin, vesaldómurin, vanlukkan, vónloysið og ólukkan hjá tí intellektuella, samstundis sum tað er her, at stórleikin og stórlæti hjá tí intellektuella stavar«.

Frástøðan er alt, ein sorg, ein lívgevandi longsul og sjálvur munurin á einum anekdotiskum menniskja og einum hugsandi, ið torir at berja sær ein »veran«.

Hetta er tíðarandin frá sekstiárunum, frá radikalismuni, frá modernismuni, eksistentialismuni og frá upplðsingarheimspekini, ið Hanus altíð hevur vart, eins og hann hevur havt eina bløðandi samkenslu við tí løstaða mannabarninum, ið sum skapningur hevur frábragandi medferð, verumáta ella lyndiseyðkenni, sum er fyri ágangi av hesum. Tí Hanus veit, at slík kunnu víðka og betra okkara egna lyndi, ferð, veruhátt og eyðkenni. Tillukku Hanus, tú hevur altíð troytt leiðina og víðka ræsurnar fyri, sum romantikarnir tóku til, tí vakra, sanna og góða.

**Kim Simonsen**

# Minningardagur teirra deyðu í ferðsluni 2002

TÍÐINDASKRIV
*Ráðið fyri Ferðslutrygd*

Komandi sunnudag, hin 7. juli 2002, verður minningardagur fyri tey, sum eru deyð í ferðsluni. Hetta er triðju ferð, at skipað verður fyri hesum minningardegi fyrsta sunnudag í juli mánaði. Á minningardegnum verða blómur lagdar á støðini, har ferðsluvanlukkur hava verið, sum hava kravt mannalív.

Fótbóltssambandið skipar fyri, at tøgn verður hildin í ein minutt, tá ið 1. deildardystirnir í fótbólti byrja sunnudagin, hin 7. juli 2002.

Vónað verður eisini, at evnið verður tikið upp í kirkjum og samkomum um vikuskiftið.

Endamálið við tiltakinum er at fyribyrgja og fáa okkum øll at steðga upp eina løtu og hugsa um hesi álvarsomu viðurskifti, sum henda so nær okkum, men sum vit eru so skjót at gloyma.

Stigtakari er Ingi Gunnarsson, og tiltakið verður stuðlað av Ráðnum fyri Ferðslutrygd, fyritøkum og einstaklingum.



# Torbjørn skal vigast

**Bjarni Djurholm er so ónøgdur við ta viðferð, hann og flokkur hansara hava fingið frá Torbjørn Jacobsen, at hann nú vil hava løgmann at taka málið upp við leiðsluna í Tjóðveldisflokkinum og taka støðu til, um atburðurin hjá tjóðveldistingmanninum skal fáa avleiðingar.**

POLITIKKUR
*Rúnar Reistrup*

Torbjørn Jacobsen hevur enn eina ferð megnað at upphitað sinnini í Fólkaflokkinum. Í Dimmalætting í gjár kom tjóðveldistingmaðurin við álvarsligum ákærum ímóti hinum stóra samgonguflokkinum um nepotismu og duldar ætlanir viðvíkjandi einskiljing av Fiskavirking. Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, sum í størstan mun stóð fyri skotum, vil nú hava løgmann at tosa við formannin í Tjóðveldisflokkinum um atburðin hjá eysturoyartingmanni floksins og meta um, hvørt Torbjørn er komin so langt út um mark, at hansara atburður skal fáa avleiðingar fyri samgonguna.

- Torbjørn Jacobsen fer yvir um alt mark við sínum asnasparki ímóti mær og flokkinum, og hann skaðar politiska virksemið hjá samgonguni, heldur Bjarni Djurholm, sum kennir seg og sín flokk so illa viðfarnan av eysturoyartingmanninum, at hann ikki kann lata sær tað lynda.

- Tá tað snýr seg um Torbjørn Jacobsen tykjast eingin mørk at verða fyri, hvat man kann vænta sær av útspillingum og ósannindum. Hann kann ikki takast í álvara. Hann bara larmar, sigur Bjarni Djurholm, sum í gjár kundi lesa eina blaðgrein, har Torbjørn millum annað leggur vinnumálaráðharran undir at vera ørindadrong fyri restina av Fólkaflokkinum og útinna duldar ætlanir um at avreiða Fiskavirking til vinir og kenningar floksins fyri lítið og lætt.

### Duldar ætlanir við Fiskavirking

Tobjørn Jacobsen segði við Dimmalætting í gjár, at Fólkaflokkurin við Bjarna Djurholm á odda vildi tæga Fiskavirking sundur og selja bitarnar fyri lítið og lætt. Hann legði vinnupolitikkin hjá Fólkaflokkinum undir at vera nepotistiskan og vísti í hesum sambandi til, at fyrrverandi fólkatingsskrivararnir hjá Óla Breckman vórðu settir í nevndarformanssessir, eftir hansara tykki fyri at fremja duldu ætlanir Fólkafloksins.

- Eg haldi meg bara til viðtøkurnar fyri Framtaksgrunnin, sum siga, at tá ein fyritøka er stabil og klárar seg væl, so skal hon - ikki kann hon - einskiljast. Tá nevndin í Framtaksgrunninum ikki vildi fremja eina einskiljing, var eg noyddur til annaðhvørt at heita á løgtingið um at broyta viðtøkurnar ella at seta eina nevnd, sum vildi virka sambært viðtøkunum, sigur Bjarni Djurholm sum svar upp á ákærurnar frá Torbjørni Jacobsen um, at hann trýsti gomlu nevndina í Framtaksgrunninum frá fyri síðan at manna hana við fólkum, sum kundu fremja eina einskiljing »eftir fólkafloksleisti til fólkafloksmenn«, sum tjóðveldistingamaðurin málbær seg.

Torbjørn Jacobsen tók í greinini í Dimmalætting í gjár æruna fyri at eiga endaligu orðingina í samgonguskjalinum um einskiljing av almennum fyritøkum, eftir at júst málið um einskiljing elvdi til rok millum Tjóðveldiflokkin og Fólkaflokkin.

- Tað er lodrætt lygn. Torbjørn hevur eitt problem, og tað er at hann altíð tilskrivar sær sjálvum størri týdning enn hann í veruleikanum hevur, sigur Bjarni Djurholm. Hann sigur Torbjørn ikki eiga nakran lut í vinnupolitisku orðingunum í samgonguskjalinum yvirhøvur.

- Torbjørn rýmdi av fundinum tá vit orðaðu vinnupolitikkin. Hann var als ikki til staðar, tá vit orðaðu brotið um einskiljing. Men soleiðis er Torbjørn. Tað var hann eisini, tá hann sat í landsstýrinum, og hansara uppblásti errinskapur skaðar nú bæði samgonguna og føroysku vinnuna, sigur Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, sum nú fer at seta seg í samband við løgmann fyri at fáa hann at meta um, hvørt nakað ítøkiligt stig eigur at vera tikið sum avleiðing av úttalilsunum hjá Torbjørn Jacobsen.

# Stjórin avger smakkin

**Føroya Bjór fór í gjár undir at selja eitt nýtt slag av øl. Talan er um eina myrka pilsnarøl, sum hevur fingið heitið Føroya Bjór Classic. Stjórin á Føroya Bjór, Einar Waag, er væl nøgdur við smakkin, og tað hevur hann alla grund til at vera. Tað er nevniliga stjórin, sum sjálvur hevur tikið endaliga avgerðina um hvussu ølið skal smakka.**

ØL
*Rúnar Reistrup*

Klaksvíksbaseraða bryggjaríið Føroya Bjór var í gjár komið til Havnar at vísa seinasta skot á stammuni fram fyri fjølmiðlunum og øðrum. Við góðum íblástri úr Danmark, har øll bryggjaríini seinastu árini hava fingið eina »Classic« øl afturat úrvalinum, hevur Føroya Bjór arbeitt seg fram til eina uppskrift til eitt myrkari pilsnarøl.

Nýggja ølið er gott fyri teir gómarnar, sum onkuntíð hava hug at troyttast av ljósa pilsnarølinum. Smakkurin í Classic ølini er sterkari og meira rundur enn í ljósu pilsnarølini, nakað sum i gulløli, men styrkin er tann sama sum hjá vælkenda Veðrinum.

Einar Waag sigur, at Føroya Bjór arbeiddi í hálvtannað ár við at koma fram til eina hóskandi uppskrift. Hann hevur sjálvur verið partur av tí smakkipanelinum, sum hevur lagt tungu, góma og háls til menningina av uppskriftini, og nú ølið fyri fyrstu ferð kom í ølsølurnar í gjár, var Einar Waag vælnøgdur við úrslitið. Sjálvur dámar honum best Veðrin, men hann heldur at Classic ølin verður góð at hava sum variatiónsmøguleiki.

Grønu etikettina til nýggja ølið hava fólk á lýsingarstovuni Team 85 teknað.

Spurdur um hvør á Føroya Bjór tekur endaligu avgerðina um nær ein øl smakkar og sær út sum hon skal, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór:

- Tað geri eg.




*Myrka Classic ølin hjá Føroya Bjór hevur í eina tíð verið at fingið í ávísum útsekinkingarstøðum. Nú fæst hon eisini til keyps á fløsku.*

*Mynd: Jens K. Vang*



Tilboðið er galdandi til 1. sep. 2002
FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum